Nr. 78/2019

Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi bústøðum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at lata Bústaðir fara undir fleiri bústaðaverkætlanir, og um so er, hvussu nógvar bústaðir er ætlanin at byggja í hesum valskeiðnum?

2. Ætlar landsstýrismaðurin at krevja, at Bústaðir virka á vinnuligum grundarlag, sum arbeiðsbólkurin mælti til?

Viðmerkingar:
Seinasta valskeið vórðu á leið hálvttriðhundrað leigubústaðir útvegaðir við Bústøðum, og svarar hetta til meira enn ein bústað um vikuna farna valskeið. Undanfarna samgonga hevði ætlanir um at lata Bústaðir útvega enn fleiri bústaðir, og við bústaðapakkanum skuldu Bústaðir fáa heimild til at læna 250 mió. kr. afturat. Men táverandi andstøða forðaði fyri uppskotinum. Nú nýggj samgonga er komin til, løgdu Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi uppskotið um bústaðir fram aftur. Men nýggja samgongan feldi tað.

Landsstýrismaðurin við bústaðamálum førdi í hesum sambandi fram, at hon vildi hava ein arbeiðsbólk at viðgera málið. Fyrst í mars mánaði handaði arbeiðsbólkurin frágreiðingina, har tað m.a. varð mælt til at lata Bústaðir virka á vinnuligum grundarlag. Arbeiðsbólkurin vísti á, at hetta fer at hava við sær, at leiguprísurin hækkar. Sambært Bústøðum er fermetraprísurin á einum leigubústaði hjá Bústøðum meira enn helvtina av prísinum hjá privatari fyritøku, sum rekur vinnuligt virksemi við leigubústøðum.

Hetta málið skuldi viðgerast politiskt, vóru boðini frá landsstýrismanninum tá. Nú tveir mánaðir eru farnir, er framvegis einki at frætta viðvíkjandi politisku ætlanunum á bústaðaøkinum.

Tað eru fólk, sum hava trupult við at fóta sær á verandi bústaðamarknaði, og sum tí mangla hóskandi tak yvir høvdið fyri ein rímiligan prís. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 6. mai 2020

Aksel V. Johannesen